GJALDSTOVAN

# KT fólk til Búskaparskipan Landsins

Búskaparskipan landsins er felagsheitið fyri skipanirnar á Gjaldstovuni, sum stuðla undir almenna roknskapin. Skipanirnar eru í høvuðsheitum: Búskettskipanin, Leiðslu-kunningarskipanin, Lønarskipanin, Rokn-skaparskipanin og Útgjaldsskipanin.

KT virksemið á Gjaldstovuni økist alsamt. Tí søkja vit eftir KT fólki at vera partur av Búskaparskipan Landsins.

**Starvsinnihald**
Høvuðsuppgávan er at umsita og menna Búskaparskipan landsins.

Arbeiðsuppgávurnar eru m.a. hesar:

- menna nýggjar loysnir
- kravfesta, skjalfesta og vegleiða
- arbeiða við trygd
- samskifta við okkara KT veitarar
- luttaka í verkætlanum
- tryggja raksturin av Búskaparskipan landsins

Búskaparskipan Landsins umsitingin stendur eisini fyri menningaruppgávum á KT økinum á Gjaldstovuni sum heild. Tøknin, sum Búskapar-skipan landsins byggir á, er fyrst og fremst Oracle.

**Førleikar**
Tú skalt vera fyrikomandi og leggja dent á at veita góða tænastu, tí nógv samskifti er við brúkarar, onnur starvsfólk á Gjaldstovuni og KT veitarar.

Tú skalt hava útbúgving, sum samsvarar við telduatstøðing ella bachelor í KT.

Búskaparskipan landsins stuðlar undir almenna roknskapin, og tí er tað ein fyrimunur at duga roknskap.

Arbeiðið fyrsta árið verður skipað so, at tú fær høvi at seta teg inn í allar tættir av Búskaparskipan landsins.

**Setanar- og lønarviðurskifti**
Starvið er fulltíðarstarv og verður sett eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og við-komandi yrkisfelag. Starvið verður lønt eftir, hvørjar royndir og viðkomandi útbúgving tú hevur.

**Starvsstaður**
Starvsstaðurin er í Klaksvík.

**Umsókn**
Umsókn við prógvum og møguligum viðmælum skal verða send til **starv@gjaldstovan.fo**

Umsóknin skal hava frámerkið "KT fólk til Búskaparskipan Landsins".

Meiri kunning um starvið fæst við at venda sær til Dáva Johannesen, deildarstjóra, á 21 24 41 ella **davur@gjaldstovan.fo**

**Umsóknarfreistin er mánadagin 14. januar 2019**.

Gjaldstovan er skipað í fýra høvuðsøki: KT Landsins, Búskaparskipan landsins, Løn & Bókhald og Talgildu Føroyar. Vit eru á leið 60 starvsfólk á Gjaldstovuni, 5 teirra eru á Búskaparskipan Landsins. Vit leggja dent á, at starvsfólk trívast og mennast, og tú fært góðan møguleika fyri førleikamenning. Vit skipa javnan fyri fakligum og sosialum starvsfólkatiltøkum. Tú fert at starvast í einum framfýsnum umhvørvi saman við dugnaligum og ágrýtnum starvsfeløgum.

**GJALDSTOVAN** | KVÍGGJARTÚN 1 | FO 160 ARGIR | FØROYAR
TEL: +298 35 24 00 | GJALDSTOVAN@GJALDSTOVAN.FO | GJALDSTOVAN.FO